## Finski aldursforsetin heldur fram

36 ára gamli Jari Litmanen gevst ikki so. Hóast skurðviðgerðir og nógvar skaðar longdi hann í gjár sáttmálan við svenska Malmö FF við einum ári Litmanen, sum áður hevur spælt við stórfeløgum sum Ajax, Liverpool og FC Barcelona, hevur bara leikt 10 landskappingardystir fyri Malmö FF, síðan hann kom til felagið í 2005. Hetta vegna hansara drúgvu skaðar.
Jari Litmanen spælir tó framvegis fyri finska landsliðið, har hann í verandi EM-undankapping er toppskjútti fyri land sítt við trimum málum.

## B71 jagstrar mál nummar 1000

B71 hevur 999 mál í søgu felagsins. Seinasta sunnudag vóru teir so nær við, sum tað yvirhøvur ber til at skora, tá Clayton Soares rakti tvørtræið, og tískil varð mál nummar 1000 ikki skotið tá.
Um páskirnar hava sandoyingar aftur møguleikan. Fyrsta møguleikan fáa teir í Gundadali, har teir vitja meistararnar HB. Seinni møguleikin verður eisini á útivølli, tá B71 fer til Klaksvíkar.



# Símun Luis og Hans Jørgen halda páskafrí

**Símun Luis Jacobsen og Hans Jørgen Djurhuus eru báðir skaddir til páskadystirnar móti AB og HB**

GÍ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Herfyri var Símun Luis Jacobsen so óheppin at detta niður úr einum stiga. Hann kom rættiliga illa fyri av hesum, breyt armin og fekk fleiri snuddir. Tískil verður hann ikki tøkur hjá GÍ um páskirnar, og kann hann halda páskafrí frá fótbóltinum. Sama kann Hans Jørgen Djurhuus, sum meiddi sær lærkrikan í dystinum móti EB/Streymi. Í Gøtu vita tey ikki heilt, hvussu umfatandi skaðin er beint nú, men tey rokna ikki við, at Hans Jørgen verður við skírisdag móti AB. – So fáa vit at síggja aftaná, hvussu verður við honum, siga tey, og tað er eisini hesin hugburður, sum valdar uppundir báðar páskadystirnar. GÍ hugsar bara um útidystin móti AB í løtuni, og tá tann dysturin er liðugur, fara tey at hugsa um HB dystin.

Tey taka ein dyst í senn og siga einki um fulla úrtøku í báðum dystunum, hóast tað er ein sannroynd, at tey í Gøtu er vónbrotin um tapið fyri sundalagsmonnum, har teir mistu alt á gólvið í yvirtíðini. Tí skulu teir helst vinna á AB hósdagin. Gera teir tað, so eru teir við aftur, men renna gøtumenn seg í enn ein ósigur har, so hava teir av sonnum fingið eina keðiliga byrjan uppá árið.

Argjamenn vilja eisini gera alt fyri at reisa seg eftir ósigurin fyri suðuroyingum, so tí verður av sonnum talan um eina spennandi og trupla uppgerð á Argjum skírisdag. Uppgávan verður ikki minni spennandi og trupul annan páskadag, tá teir bresta saman við meistararnar úr HB, sum teir høvdu eitt gott tak á í fjør og vunnu tvær ferðir.

# Skil skal fáast á spælið

**Í Runavík eru teir væl nøgdir við hugburðin hjá NSÍ liðnum, men teir halda avgjørt, at møguleiki er fyri betri leikligum avriki**

NSÍ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Full úrtøka á Sandi og nú tveir heimadystir. Tað kann ikki útilokast, at NSÍ eftir trý umfør framvegis fer at hava fulla úrtøku, men møguleikin fyri stigamissi ímóti B36 og Skála á heimavølli er eisini sannlíkur.

Leikliga avrikið í 1-0 sigrinum á Sandi var einki at rópa hurrá fyri. Í NSÍ eru teir tó sera fegnir um hugburðin, sum varð sýndur, og sum í síðsta enda var viðvirkandi til, at tað í yvirtíðini eydnaðist at skora sigursmálið.

Tað tekur sína tíð at samanspæla lið við so nógvum nýggjum monnum, men í NSÍ siga teir seg rokna við, at spælið fer at batna. At hugburðurin verður varðveittur er sea týdningarmikið.

Allir teir somu NSÍ spælararnir eru tøkir undan heimadystunum Skírisdag ímóti B36 og 2. páskadag ímóti Skála, sum vóru í ferðalagnum á Sandi. Tá var Bogi Løkin allar 90 minuttirnar á beinkinum, tí hann var ikki komin seg heilt eftir skaða. Bogi hevur vant í hesi vikuni, men tað kann væl hugsast, at hann aftur verður á beinkinum – í hvussu so er ímóti B36.

Pól Thorsteinsson er framvegis burturstaddur, og veteranurin verður tískil ikki í NSÍ miðverjuni í morgin.

Í fjør eydnaðist tað ongantíð NSÍ at fáa fulla úrtøku burturúr ímóti B36. NSÍ var tvær ferðir í Gundadali. Burturúr teimum báðum vitjanunum fekk NSÍ eitt stig. Tá ið B36 var í Runavík, var úrslitið eisini javnleikur.

NSÍ hevði í fjør tvær ferðir vitjan av Skála. Aðra ferðina vann NSÍ 2-0, og hina ferðina vann NSÍ 2-1. Tá ið NSÍ var á Skála, vunnu skálamenn 2-0.

# Góður hugburður við í ferðalagnum

**Í samansetta suðuroyarliðnum ætla teir sær at hava stig við sær aftur úr Klaksvík, og teir kenna seg eisini hava møguleika, tá ið B36 fer at vitja**

VB/SUMBA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fótbóltslagið er gott í sunnara parti av Suðuroy. Felagsliðið hjá VB og Sumba fekk fult, tá ið teir sunnudagin høvdu vitjan av uppflytarunum av Argjum. Tað var týdningarmikil sigur. Ofta hevur VB/Sumba byrjanin verið ikki serliga sannførandi, og tað hevur borið við sær, at liðið beinanvegin hevur kent trýst á sær og hóttan av niðurflyting.

Alt fólkið, sum var við til at vinna á AB, er tókt undan ferðini til Klaksvíkar í morgin. VB/Sumba vitjaði tvær ferðir í Klaksvík í fjør. Fyrru ferð taptu teir 3-0, og seinnu ferðina fóru gestirnir avstað aftur við 1-0 sigri.

Tað ræður um at halda tørn í verjuni sum longst. Um tað eydnast, so fer trýstið á heimaliðið at økjast, og so kann tað so væl koma fyri, at Birgir Jørgensen ella onkur annar fær møguleika fyri at gera mál í hinum endanum.

2. páskadag verður mótstøðan ikki minni ógvuslig hjá VB/Sumba. Tá fer B36 at vitja á Vágseiði, har árstalsfelagið seinnu árini hevur staðið seg rættuliga væl.

Góð úrslit í fyrstu umførunum styrkja avgjørt sjálvsálitið á liði, sum er mannað við so nógvum ungum monnum, sum VB/Sumba er.

Í Suðuroy fegnast teir um, at tað tykist ganga væl í yngru deildunum hjá liðunum, sum eru samansett av spælarum úr allari oynni. Fegnast verður um, at bæði dreingjaliðið og smádreingjaliðið eftir fyrstu umførini eru fremst í landskappingini. Í staðin fyri at leggja rygg til keðilig tap, sum einstøku feløgini ofta áður hava gjørt, kennist tað hugaligt við góðum felagsliði at vera við, har tað er stuttligt at kappast. Tað birtir undir hugin at venja og dystast.